

Mynd: Álvur Haraldsen

# Fjallasúkklararnir skulu á landsliðið

**SÚKKLING** Tríggir fjallasúkklarar skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum í summar. Úttøkukapping verður í dag

Uni Holm Johannesen

Tað eru tríggir fjallasúkklarar, sum skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum í tveimum kappingunum. Úttøkukappingin verður í dag, 20. apríl. Tað verður súkklað kring viðarlundina í Hoydølum.

Á Oyggjaleikunum verður kappast í bólkunum MTB Criterinum og MTB Cross Country. Súkklararnir kappast bara í hesum seinna bólkinum í úttøkukappingini í dag.

Munurin á kappingunum er, at tað verður súkklað í ein góðan tíma á MTB Criterinum. MTB Cross Country tekur vanliga millum tveir og hálvantriðja tíma.

*uni@sosialurin.fo*

# Popczynski heldur fram

**FÓTBÓLTUR** Krzysztof Popczynski, sum hevur verið venjari hjá fleiri føroyskum feløgum, hevur longt sín sáttmála við Aarhus Fremad

Uni Holm Johannesen

Tað var í 2008, at Krzysztof Popczynski takkaði fyri seg í føroysku kappingini og fór til Danmarkar. Tilboðið sum høvuðsvenjari hjá Aarhus Fremad, sum spælir í triðbestu donsku deildini, var meira áhugavert. Tá var liðið í miðbólkinum í deildini. Nú er Popczynski partur av stríðnum um uppflyting.

Nú er sáttmálin longdur fram til summarið 2013.

– Hann hevur gjørt eitt frálíkt arbeiðið. Felagið flytir seg rætta vegin við honum sum høvuðsvenjara, sigur Søren Østergaard, formaður í felagnum.

Aarhus Fremad er á triðjaplássi í 2. division Vest, seks stig aftan fyri oddaliðið Blokhus FC. Liðini bresta saman í morgin.

# Páskirnar eru strævnar

**FÓTBÓLTUR** Tríggir dystir í átta dagar. Skráin hjá fótbóltsspælarunum í bestu deildini er strævin um páskirnar, nú liðini royna at byggja skrokkin til eitt stórsligið kappingarár

Uni Holm Johannesen

Feskasta dømið var í fjør. Tá fekk Heðin Askham at sanna, at tað er umráðandi at leggja væl frá landi. Høvuðsorsøkin, at EB/Streymur ikki vann føroyameistaraheitið var keðiliga byrjanin. Sundalagsmenn mistu ov nógv stig beinanvegin, og so var tungt at vinna innaftur.

Liðini í Vodafonedeildini spæla tríggjar dystir eftir átta døgum nú. Fyrsti dystirnir vóru spældir síðsta vikuskiftið. Eitt umfar verður avgreitt í morgin, og fjórða umfar verður spælt mánadagin.

## KÍ er væl fyri

Klaksvíkingar eru byrjaðir væl. Teir hava fulla úrtøku eftir tveimum landskappingardystum. Í morgin vitja teir ÍF, sum tapti við heili fýra mál á heimavølli fyri EB/Streymi. Uppreisn er fremst á breddanum hjá fuglfirðingum, sum ætla sær at stríðast um heiðursmerkini.

Oddmar á Lakjuni verður við á liðnum hjá KÍ.

– Enn hava vit bara møtt liðum í lægra endanum av Vodafonedeildini frá 2010, so vit vita, at mótstøðan fer at gerast harðari. Tó vístu vit góðar taktir til fleiri venjingardystir og vístu, at vit kunnu skava nøkur stig saman, um vit standa saman um eitt lið og bakka hvønn annan upp, sigur Oddmar á Lakjuni við nordlysid.fo.

Klaksvíkingurin Jákup Mikkelsen ásannar, at fuglfirðingar eru ikki nøgdir við fyrstu dystirnar.

– Spælið hevur als ikki hingið saman á sama hátt sum í fjør, men trupult er at meta um, hví so er. Til venjingarnar hevur tað sæð fínt út. Tað positiva er tó, at vit hava fingið trý stig burtur úr tveimum »lorta« dystum, sigur Jákup Mikkelsen við Norðlýsið.

## B71 í Gundadal

Sandoyingar eru ikki byrjaðir væl. 10 ferðir er Símun Rógvi Hansen, málverjin, farin í meskarnar eftir bóltinum. B71 tapti við seks málum fyri uppflytarunum KÍ, og rann mest sum bara aftaná síðsta vikuskiftið, tá liðið vitjaði B36. Sigfríður Clementsen, fótbóltsvenjari, hevur greiða støðu.

– Tað er líkt til, at B71 fær tað sera trupult í ár, og hóast bara tveir dystir eru spældir, vænti eg, at sandoyingar flyta niður, sigur hann.

Nú skulu Piotr Krakowski, venjari, og hansara spælarar aftur í Gundadali. Hesa ferð bíða føroyameistararnir. HB hevur trý stig av seks møguligum, og tað skal ganga illa, um havnarmenninir ikki fáa fult.

## Víkingur og B36

Víkingur og B36 spæla í Norðagøtu í morgin. Tað er ein treyt, at næsti føroyameistarin vinnur flest møgulig stig á heimavølli. Tí eru trý stig eitt krav hjá Víkingi, tá B36 vitjar í morgin.

Árstalsfelagið úr høvuðsstaðnum hevur vunnið fyrstu dystirnar. Heimasíðan hjá Víkingi hevur greiða støðu.

– Vit í Víkingi hava ikki fingið eins góða byrjan og B36, men kappingarársbyrjan okkara er so avgjørt góðkend, skrivar vikingur.fo. Byrjanin verður neyvan góðkend, um B36 fær fult í Sarpugerði í morgin.

*uni@sosialurin.fo*

# Nú skal B68 hava stig

**FÓTBÓLTUR** Toftamenn eru undir trýsti undan grannauppgerðini í kvøld. Teir hava framvegis einki stig í skjáttuni

Uni Holm Johannesen

Fótbóltsvøllurin við Løkin í Runavík er karmur um grannauppgerð í kvøld. Bill M. Jacobsen og B68 eru undir trýsti. Toftamenn hava framvegis einki stig fingið eftir tveir landskappingardystir. Teir hava tapt fyri ÍF á heimavølli og KÍ á útivølli. Nú er møguleikin at fáa uppreisn eftir tapið fyri klaksvíkingum um vikuskiftið.

Bill M. Jacobsen hevur allar mans tøkar. Hópurin verður tann sami sum seinast, umframt at Dion Splidt, sum kom úr AB í vetur, verður við. Hann hevur ikki verið við fyrstu dystirnar.

Klæmint A. Olsen er framvegis leikbannaður hjá NSÍ. Hann var útvístur í fyrsta landskappingardystinum, tá HB vitjaði í Runavík. Hann fekk leikbann í tveir dagar, og noyðist at sita uttan fyri í kvøld afturat, áðrenn hann kann fara aftur í gulu troyggjuna hjá NSÍ.

Dysturin byrjar klokkan 18.00.

## Fótbóltsdystirnir um páskirnar

**Mikudagin, 20. apríl:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| VODAFONE | NSÍ - B68 | Runavík | 18.00 |

**Hósdagin, 21. apríl:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| VODAFONE | Vík. - B36 | Norðagøta | 15.00 |
| VODAFONE | EBS - 07V | Streymnes | 15.00 |
| VODAFONE | HB - B71 | Tórshavn | 15.00 |
| VODAFONE | ÍF - KÍ | Fuglafj. | 15.00 |
| 1 DEILD KV | AB - B36 | Argir | 17.15 |
| STEYP. KV | Giza - Vík. | Argir | - |
| STEYP. KV | MB - B68/NSÍ | Miðvágur | |
| STEYP. KV | ÍF - HB | Fuglafj. | 12.00 |
| STEYP. KV | FCS - EBS | Vágur | 13.00 |

**Leygardagin, 23. apríl:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 DEILD M | EBS - Ská. | Streymnes | 14.00 |
| 1 DEILD M | FCH - Vík. | Tórshavn | 14.30 |
| 1 DEILD M | TB - 07V | Hvalba | 15.00 |
| 1 DEILD M | HB - NSÍ | Tórshavn | 15.00 |
| 1 DEILD M | AB - FCS | Argir | 17.00 |

**Mánadagin, 25. apríl:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| VODAFONE | 07V - KÍ | Sørvágur | - |
| VODAFONE | B68 - HB | Toftir | - |
| VODAFONE | B71 - Vík. | Sandur | - |
| VODAFONE | B36 - ÍF | Tórshavn | 15.00 |
| VODAFONE | EBS - NSÍ | Streymnes | 17.00 |
| 1 DEILD KV | Vík. - HB | Norðagøta | - |
| 1 DEILD KV | B36 - Ská. | Tórshavn | 12.30 |
| 1 DEILD KV | AB - KÍ | Argir | 13.00 |